


Vit søkja:

**Lærlingar & Sølufólk**

fá nærri at vita á www.farodane.fo

**FARODANE**

Brekkutún 4 - FO-100 Tórshavn - Tlf. 311414 - farodane@farodane.fo




Sosialurin
www.sosialurin.fo



## Næmingar við yvirskoti

Alexandur Johansen er ein av teimum nýggju kundaráðgevunum í Sparikassanum. Starvið er avbjóðandi og krevjandi, men tað forðar ikki Alexanduri í at hava tíð og yvirskot í gerandisdegnum.

Ungi strandingurin er dømi um, at tað ber væl til at fáa eitt avbjóðandi starv í Sparikassanum at spæla saman við einum mennandi og tíðarkrevjandi frítíðarítrivi. Yvirskotið er har.

Stutt er fráliðið, síðani Alexandur varð útlærdur í peningastovnsyrkinum, og nú søkir Sparikassin aftur eftir næmingum. Næmingarnir fara at arbeiða í Suðuroy, Streymoy og Eysturoy.

Sum næmingur í Sparikassanum fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving innan peningastovns- og viðskiftatænastu. Tú fært kunnleika til at veita bæði privatum og fyritøkum fíggjarligar tænastur og ráðgeving í einum hátøkniligum umhvørvi.

Vit sóknast eftir lívligum og óhátíðarligum persónum, sum eru eldhugaðir bólkaspælarar og kenna, at ábyrgdarkensla og góð tillagingarevni skapa íblástur. Í okkara arbeiðsumhvørvi er týðandi, at bæði starvsfólk og kundar trívast og mennast. Vit leggja eisini dent á opið og ærligt prátingarlag, ið mennir ein felags hugburð millum starvsfólk og kundar.

Í næmingatíðini ert tú við í próvgevandi lærugreinum, samstundis sum tú gongur í peningastovnsskúla. Næmingatíðin er 2 ár.

Umsøkjarar skulu hava lokið HH-, students-, HF- ella tilsvarandi prógv. Eisini næmingar, ið taka prógv í summar, eru vælkomnir at søkja.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Marjuna Eystberg, starvsfólkaleiðara, tlf. 348510, teldupost marjun.eystberg@sparikassin.fo.

Send umsókn við avriti av próvskjølum í seinasta lagi fríggjadagin 17. juni 2005 kl. 12.00.

Føroya Sparikassi
Att.: Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðari
Postsmoga 34
FO-110 Tórshavn

Føroya Sparikassi hevur 16 deildir kring landið. Á deildunum veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Hetta er í tráð við visión Sparikassans, sum er at vera brúkaravinaligasti peningastovnur í Føroyum. Ætlanin er at seta næmingar á deildum í Suðuroy, Streymoy og Eysturoy.

FØROYA SPARIKASSI